# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Skitsofrenur Javnaðarflokkur

Helst mundu fleiri trúgv javnaðarfólk anda lættan, tá formaður Javnaðarfloksins á tingi, John Johannessen, á sjónvarpsskíggjanum í gjárkvøldið púra greitt afturvísti, at Javnaðarflokkurin hevur nakað sum helst við uppskotini um at hækka pensjónsaldurin, at mótrokna í pensjónum og onnur uppskot, sum hava verið frammi seinastu tíðina, at gera. Uppskot, sum í stóran mun skerja gerandisdagin hjá veikasta samfelagsbólkinum, sum vit hava víst á fleiri ferðir á hesum stað.

Var hetta nú veruleikin, sum John Johannessen borðreiddi við í Degi og Viku? Um so er, so er veljarakanningin hjá Fynd helst gjørd á púra skeivum grundarlag – og so hevur Javnaðarflokkurin ikki fortjent tann lemjandi kritikkin, sum nú heglar yvir flokkin – og so hevur Jóannes Eidesgaard eisini rætt, tá hann sigur, at Javnaðarflokkurin er dumpaður í marknaðarføring, tí hann dugir ikki so væl at »selja seg« sum til dømis Sambandsflokkurin.

Hyggja vit í ólavsøkupakkan hjá landsstýrinum, sum Jóannes Eidesgaard, fíggjarmálaráðharri og formaður Javnaðarfloksins, legði fram, so stendur har, at pensjónistar ikki longur skulu fáa sjúkradagpengar, at mótroknast skal við 25% frá fyrstu krónu hjá fyritíðarpensjónistum. Har stendur eisini, at vit skulu hava eina pensjónsnýskipan, sum fer at lækka útreiðslur til almennar eftirlønir – og dentur verður lagdur á, at talið av eldri fólkum um nøkur fá ár fer at økjast.

Hvussu kann formaður floksins á tingi tá koma og siga, at Javnaðarflokkurin hevur lammað nevan í borðið og hevur víst hesum aftur, tá sjálvur floksformaðurin leggur hetta fram? At veljarin er ørkymlaður – og at trúgvu stuðlar floksins ressast við – er als ikki løgið, tí kann høgra ikki vita, hvat vinstra ger, ella hvat?

At tað eru embætisfólk, sum hava gjørt eitt álit, tað er so tað. Men tað er so á onkran hátt tikið við í politikkin hjá landsstýrinum, og tí kann Javnaðarflokkurin ikki skáka sær undan. Vit kunnu hóskandi seta spurningin, hví Javnaðarflokkurin ikki skiftir kós. Um kósin ikki kann haldast í einum borgarligum landsstýri, so er bara at stinga í sekkin.

Hendan hóttanin um eldrabylgjuna tykist heldur ikki logisk. Ongantíð áður hava búð so nógv fólk í Føroyum, sum nú. Vit vita eisini, at burðartalið í Føroyum er av tí hægsta í øllum Evropa. Hugsa vit um stóru fráflytingina, so kann hon gera, at fólktatalið stendur í stað ella kanska minkar. Men hví so ikki gera nakað við tað? Hví kann Javnaðarflokkurin ikki bróta upp um ermar og koma við uppskotum um, hvussu vit fáa faklærd fólk at flyta heimaaftur, hvussu vit kunnu fáa allar tær túsundtals føroysku kvinnurnar, sum til dømis arbeiða sum sjúkrasystrar, lærarar, pedagogar o. a. í Danmark at flyta heim við sínum børnum? Tað hevði í øllum førum ført til økt fólkatal, sum aftur førdi til, at vit vóru fleiri um at bera byrðarnar av teimum eldru, sum so lutvíst gjørdust færri.

Skitsofrena Javnaðarflokkinum vantar visjónir.

**Sosialurin**

## Tann óhefti viðmerkjarin

**HENRIK OLD**



Løgið at hoyra fyrrverandi fornermaða javnaðarmannin Jóannes N. Dalsgaard vera høvuðsviðmerkjara í útvarpinum um støðuna hjá Javnaðarflokkinum. Hvussu kann ein maður, sum er rýmdur úr einum flokki, tí hann ikki fekk sín vilja, vera óheftur viðmerkjari um politisku støðuna hjá sama flokki? Hetta má kringvarpsstjórin hava eina meining um og koma út við.

Tá fullveldisøðin var upp á tað villasta vóru allir flokkar drignir við at koma við einari ella aðrari loysn upp á framtíðar viðurskifti ímillum Føroyar og Danmark. Fyri Javnaðarfloksins viðkomandi var úrslitið tann sonevnda sjálvstýrislógin. Hjá Sambandsflokkinum var nýskipanaruppskotið svarið.

Ein av høvundunum aftan fyri uppskot Javnaðarfloksins um sonevndu sjálvstýrislógina var Jóannes N. Dalsgaard. Orsøkin til at hann kom í hendan bólk var millum annað eftir uppskoti frá undirritaða, sum var ein av teimum, sum var troyttur av at hoyra hansara óteljandi mjarran á landsfundum Javnaðarfloksins um vantandi sjálvstýrispolitikk Javnaðarfloksins.

Maðurin fann ikki útav, at høvuðspolitikkurin hjá Javnaðarflokkinum var ikki sjálvstýri, og tí var ikki undirtøka fyri hansara sjónarmiðum á mongum landsfundum. Hvat ger man fyri at fáa frið at halda landsfund? Ein góður gamal máti, fyri at fáa summi at tiga, er at velja tey í eina nevnd. Tá Jóannes N. Dalsgaard fann út av, at hann ikki fekk undirtøku fyri sínum sjónarmiðum í Javnaðarflokkinum, rýmdi maðurin í øðini.

Tað næsta sum hoyrdist til tann óhefta viðmerkjaran var, at hann var valevni fyri Gamla Sjálvstýri í Norðurstreymi. Síðani hevur Jóannes N. Dalsgaard fyri opnari mikrofon hjá Útvarpinum brúkt allar møguleikar at hegla niður á Javnaðarflokkin um júst tey tingini, sum hann ikki kláraði at fáa ígjøgnum, meðan hann var inni í flokkinum.

Mín spurningur til kringvarpsstjóran - sum vanligvís ikki svarar - og Kringvarpsstýrið er:

- Hvussu fríar ræsur kann ein, sum kallar seg óheftan, fáa í almenna útvarpinum til at koma við púra høpisleysum gitingum, sum vit upplivdu í tíðindasendingini á middegi í dag?

- Er tað veruliga so, at man kann fáa fríar ræsur í almenna útvarpinum at viðgera innhýsis viðurskifti í einum flokki, sum man sjálvur er rýmdur úr, og samstundis kalla seg fyri óheftan viðmerkjara?

Svarar kringvarpsstjórin ikki, so fer spurningurin víðari til Kringvarpsstýrið seinni.

## Tíverri, Bjørn Kalsø, syrgiligi sannleikin er, at Sambandið setti skattalættar fram um pensjonistar

**HANS PAULI STRØM**
Løgtingsmaður fyri Javnaðarflokkin



Bjørn Kalsø hevur fingið ilt av tí, at eg í grein vísi á tey stóru framstigini sum hendu til frama fyri pensjonistar árini 2004-08, tá Javnaðarflokkurin hevði ábyrgdina av almanna- og heilsuøkinum. M.a. at:

• Pensjónin hjá stakum pensjonisti hækkaði úr 7.800 kr/mán til 10.300 kr/mán.

• Hjá pensjonistahjúnum úr 12.370 kr/mán til 16.970 kr/mán.

• Lægsta fyritíðarpensjón hækkaði við tilsamans 2.660 kr /mán.

• Mótrokningin av aðrari inntøku hjá fyritíðarpensjonistum varð lækkað úr 60 niður í 30%.

• Stuðulin til dagtilhald og mattænastu fyri pensjonistar varð øktur úr 3 til 7 mió kr.

• 159 nýggj búpláss vóru tikin í nýtslu á røktarheimum og eldrasambýlum

•210 fólk aftrat komu at arbeiða í heimarøktini og eldrarøktini annars.

Bjørn Kalsø fær serliga ilt av, at eg samstundis vísi á, at síðan Sambandið við Rósu Samuelsen yvirtók ábyrgdina á almannaøkinum er bert gingið afturá:

• Javningin av viðbótini hjá fólkapensjonistum er minkað úr 4 niður í 3%

• Javningin av allari pensjónini hjá fyritíðarpensjonistum er minkað úr 4 niður í 3%

• Allur stuðulin til dagtilhaldini til hjá pensjonistum uppá 4 mió kr er skorin burtur.

• Egingjaldið hjá pensjonistum fyri heilivág er hækkað munandi.

Bjørn Kalsø vil vera við, at í fyrru ABC-samgonguni hendu teir stóru batarnar á pensjónsøkinum, tí at Sambandsflokkurin sat á pengakassanum. Tann syrgiligi sannleikin er tíverri, at tá vit skipaðu fyrru ABC-samgonguna í feb. 2004 hevði Sambandið eittans ynski, og tað var saman við Fólkaflokkinum at fáa so stórar skattalættar sum gjørligt til tær góðu inntøkurnar. Mótkravið hjá Javnaðarflokkinum var at fáa so stórar hækkingar á pensjónsøkinum sum gjørligt.

Eg harmist um, at tað tíverri eydnaðist alt ov væl hjá fíggjarmálaráðharranum hjá Sambandinum at deila feitar skattalættar út til tær góðu inntøkurnar. Hinvegin eydnaðist tíbetur Javnaðarflokkinum til fulnar at fremja lyfti okkara um stórar hækkingar fyri pensjonistarnar, so sum víst er á omanfyri.

Hetta var ikki so galið. Tí virðið av skattalættunum hjá Sambandinum minkar við árunum so líðandi burtur í onki, so hvørt inntøkurnar í samfelagnum veksa.

Hinvegin veksur virðið av hækkaðu inngjøldunum til Samhaldsfasta fyri hvørt ár sum gongur, so útgjaldið til pensjonistarnar kann hækkast við einum støðugt størri upphædd á hvørjum ári.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.